# 61. tími - Mikkjal á Ryggi



*Mikkjal og Bina á Ryggi, myndin er helst tikin áðrenn tey eru gift.*
*(Mynd: Jóhan Elias Mikkelsen)*

Mikkjal Dánjalsson á Ryggi varð føddur í 1879 í Miðvági. Sum ungur arbeiddi hann bæði á sjógvi og á landi. Tó var hann bókliga áhugaður, og tí fór hann niður til Danmarkar á háskúla.

Hóast hann ikki var læraralærdur, arbeiddi hann sum lærari í Bø og í Gásadali. Har arbeiddi hann í 25 ár. Mikkjal doyði eftir langa sjúkralegu í 1956.

Í Sálmabók Føroya fólks eigur Mikkjal á Ryggi flestar sálmar. Í sálmaskaldskapi hansara merkist, at hann hevur eina sterka gudstrúgv og er bjartskygdur.

Nakrir av hansara kendastu sálmum og sangum eru: „Tú fylgdi mær fyrst, tá í vøggu eg lá", Lívligt er í bønum í dag" og „Tað var ein fagran summardag".

Sálmurin „Eg veit ein góðan seyðamann" er ein av kendastu sálmum hansara. Her yrkir hann út frá líknilsinum, sum Jesus segði lærusveinum sínum, um hin góða hirðan.



